# Tiltøk

**Aftankvirra í Havnar kirkju**
Fríggjakvøldið 4. mars
kl. 21-23. Kl. 22 spælir Jens Mortan Mortensen, organistur, orgul.
Kl. 22.30 andakt.

**Adventistakirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugrannsking við Birgir Johannesen. Kl. 11 Gudstænasta við Allan Falk.

**Christianskirkjan**
4. mars Ten-sing hugnaløta í kirkjukjallarnum kl. 15 Elsa Funding prestur kemur at greiða frá bíbliutýðingunum. Eisini verður annað á skránni.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Fríggjakvøldið 4. mars verður Altjóða Kvinnubønardagur í Oasan kl. 19.30, har allar kvinnur kunnu vera við.

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum.
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ára aldri. Øll verða koyrd heim eftir møtið. Verið vælkomin. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/ sunnudagsskúla. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið vælkomin.

**Hebron á Argjum**
Mikudagur
Kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur
Kl. 20 Húsbólkar og tí einki møti í Hebron.
Fríggjadagur
Kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur og menn.
Sunnudagur
Kl. 10.30 Morgunmøti
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Kl. 12 Møti. Jógvan Jacobsen talar um Efesusbrævið.
Hjartaliga vælkomin í Hebron

**Evangeliihúsið**
Mikukvøldið kl. 18 Vit koma saman.
Sunnudagin kl 11 Familju og morgunmøtið, UV-night kl 19.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Altjóða kvinnubønardagur í Oasuni.
www.gospel.fo

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Evnið: Jes 4 við Hera Tróndheim.
Sunnudagur kl. 11 Sunnudagsskúli í kirkjutíð. Kl. 18 Møti við Hera Tróndheim.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Mikukvøldið møti kl. 20.
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Hjørleif Poulsen.

**Fríkirkjan Oasan**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøtið.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Altjóða Kivnnubønardagur
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Magnus Simonsen.
Kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagur 2. mars kl. 19 í KFUM: Ten-sing venur. Hetta er fyri ungdómin.
Hósdagur 3. mars kl. 20 í KFUK: Varðmenn hittast.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøldið kl. 20 Felsgs kóri venur
Hósdagur kl. 16 Gentukóri venur. Kl. 20 Ungdómsmøti v/ Marius Múller.
Sunnudagur kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Sylverius Jacobsen. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Hósdagin kl. 15.45 Gentukórið
Kassia venur. Kl. 20 Ungdómsmøti. Jákup N. Olsen talar.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Per Mortensen talar.
Barnaansing í Lítla Sali.
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangelisktmøti.
Barnaansing í Barnarúminum.
www.ebenezer.fo

**Filadelfia Tórshavn**
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. kl. 18 Delli, børn frá 3. til 6. flokk.
Fríggjakvøldið kl. 20 Mammur hittast til bøn kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti kl. 13.15 sundagskool.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Kl. 19 Andakt á Sambýlinum Oman Hoydalar. Kl. 19 Cellegruppa fyri menn.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómskvøld. Kl. 20 Heimaforbundið fyri kvinnur í øllum aldri
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti v/Sunnudagsskúla.
Kl. 18 Møti. Eisini er bønardagur hjá Frelsunarherinum í Tórshavn. Generalurin hevur avgjørt, at í 2011 skulu Korpsini biðja hvønn dag fyri sosialum rættvísi kring heimin, og Tórshavn Korps eigur bønardag 6. mars. Tá er Frelsunarherurin opin frá kl 11 til 18, har ein kann koma inn at biðja. Ein bønarvakt verður í bønarrúminum.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Mikukvøldið kl. 20 sangløta

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíblitími.

**Miðvágs Missiónshús**
Sjómanskvinnuringarnir í Sørvági, Sandavági og Miðvági koma saman í Missiónshúsinum mikukvøldið kl. 20. Burturluting verður og Torleif Johannesen verður við. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Skála Blákrossfelag**
Almenn hugnaløta og limafundur verður í Meinigheitshúsinum á Skála fríggjakvøldið 4. mars kl. 19. Byrjað verður við náttturða. Hjalmar Hansen greiðir frá arbeiðinum hjá Bláa Krossi. Sangur við m. a. Tórbjørn og Bill. Øll eru vælkomin.

**Keldan Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við luttøku úr Mariager.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Kaj Otto Frederiksberg o.fl.
Barnamøti kl. 17.
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómanskvinnuringur kemur saman mikukvøldið kl. 19.30.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30
Bønarmøti. kl. 20.30
Ungdómsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Liljur
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Mikudagin kl. 17.30 Barnaringur. Kl. 19.30 Bønarløta
Kl.20. Bíbliutími.
Fríggjadagin kl. 16 Seinnapartssamkoma

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 18
Familjumøti v. Judiht Petersen.
Nátturðu. Innsavnan.

**KFUM og K í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Petur Martin. Evni: Pætur

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30
Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti
Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.

**Vikuskiftismøtir í Kalsoy**
Hósdagur Skúlin á Trøllanesi. Møti kl. 19.30 við Jóhan Henriksen Heðin Askham, syngur
Fríggjdagur Avhaldshúsið í Mikladali. Møti kl. 19.30 við Torleif Johannessen, sjómanstrúboðara. Eisini kemur Torleif at vísa myndir og siga frá toymisferð í Grønlandi.
Leygardagur Húsar kirkja. Møti kl.19.30 við Olaf Magnussen. Streingjakórið í KFUM & K í Klaksvík syngur.
Sunnudagur Skúlin á Syrðadali Møti kl. 16 við Pól Johannessen og Egil Joensen. Øll vælkomin til øll møtini.

**Frelsunarherurin Vágur**
Tórskvøldið kl. 20 streingjakór øvar øll sangáhugaði eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
**Týsdagin 1. mars** kl. 15 verður áhugavert tiltak í Tilhaldinum. Hans Holm, landafrøðingur fer at kunna um núverandi støðuna í Miðeysturi. Øll eru vælkomin.
**Tilhaldið verður 13 ár 12. mars.** Føðingardagur verður mánadagin 14. mars.
Somuleiðis verður nevndarval mánadagin 14. mars. Tveir nevndarlimir standa fyri vali (Katrin Dahl og Eilif Samuelsen). Uppskot til nevndarvalið skulu leggjast í postkassan í gongini.
Mikudagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 14-17 Prát.
Hósdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið vegleiðing kl. 15-16 Arnhold Fjalstein.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Lesibólkurin hittast 24 febr. kl. 11. Vit lesa: Norska Løva, Jógvan Isaksen, Samskipari Marna Olsen.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Vit trena til kappingina í mai mðr.
Fríggjadagin
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn vælkomnir.
Kl. 13-16 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Vit hittast í Losjuni. Føstulávintshugni og føroyskur dansur verður í Losjuni mikukvøldið 2. mars kl. 19.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Calarasi Missiónin**
Hjálp okkum at geva svongum børnum í Romenien eina heita máltíð um dagin. Konto í Eik: 9181 4252669
Bank Nordic: 6460 1618549
Takk fyri tín stuðul.

**Samuelskirkjan**
Frìggjakvøldsdøgurði í Samuelskirkjuni. Fríggjakvøldið 4. mars kl. 18.30 verður hugnaløta í Samuelskirkjuni á Thorsgade 65. Til matna er Kalvafisk, kaffi og desert. Kostnaður 110 kr. Hans J. Hermanson fer at hugleiða um Grindina í Føroyum. Hevur tú hug at vera við, skalt tú ringja til Hervør á tel. 36498402 ella til Sigrid á tel. 42247282 innan mikudagin 2. mars. Komandi tiltak verður 3 april. Til matna verður Rast kjøt. Tað er guðstænastur:
20. mars kl. 14 - 3. apríl kl. 14
17. apríl kl. 14 - 24. apríl kl. 14
1. mei kl. 14 - 15. mei kl. 14
5. juni kl. 14 - 19. juni kl. 14.

# Merkisdagar

## 80 ára føðingardagur
4. mars fyllir Thomas K. Vilhelm, Vágur, 80 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá hann eru vælkomin hjá dóttrini á Spógvavegi 16 í Tórshavn frá kl. 18 leygardagin 5. mars.

## 80 ára føðingardagur
Fríggjadagin 4. mars, verður Anna Egholm í Havn, ættað av Glyvrum, 80 ár. Dagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9. Har verður opið hús, frá kl. 10.30 til 15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 70 ára føðingardagur
Leygardagin 12. mars, verður Anfinnur Huusgaard, Syðrugøta, 70 ár. Dagurin verður hildin í Valhøll kl. 19. Tey ið vilja heilsa uppá Anfinn, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 3. mars, á tel. 441378 ella 211378.

## 65 ára føðingardagur
11. mars verður Ellbjørg Davidsen, 65 ár. Dagurin verður hildin 6. mars í Starvsmannafelagnum frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 30 ára føðingardagur
7. mars verður Niels Heðin Gaard Joensen 30 ár. Dagurin verður hildin í hølinum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn tann 12. mars frá kl. 18. Tey ið vilja gleða meg, við at halda dagin saman við mær, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 3. mars á tlf. 316422 ella 221364.

## 30 og 50 ára føðingardagar
Mánadagin 7. mars fyllir Súni Olsen, Syðrugøta, 30 ár og fríggjadagin 11. mars fyllir Dánjal Jarnskor, Norðragøta, 50 ár. Føðingardagarnir verða hildnir saman leygardagin 12. mars í heiminum hjá Dánjali í Kongsbø 5 í Norðragøtu frá kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Brúdleyp
5. mars giftast Sólbjørg Jacobsen og Hans Filip Mohr Jakobsen í Kelduni í Skálabotni. Vígslan verður kl. 13 og reception verður í Kelduni beinleiðis eftir vígsluna. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 2. apríl giftast Karla A. Vang, úr Kaldbak og Anton Rasmussen, úr Runavík. Vígslan verður í Nazaret, Kaldbak, kl. 13. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg hjá Karlu tlf. 265714 ella Anton tlf. 504279 innan 10. mars.

Leygardagin 9. apríl kl. 13 giftast í Kvívíkar kirkju, Jacoba Vang, Leirvík og Leif Sjúrður Petersen, Leynar. Vælkomst, uttan børn, verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, vinarliga boða frá á tlf. 250268, 281947 ella teldupost: vang94@hotmail.com innan 5. mars.



Leygardagin 16. apríl giftast Olina Skorá og Pauli Høj. Vígslan verður í býráðssalinum kl. 14. Øll eru vælkomin. Brúdleypsveitslan verður á læraraskúlanum kl. 19. Tey ið vilja gleðast saman við okkum, kunnu tekna seg innan 25. mars á tlf. 590200 - 584969 eftir kl. 15. Vit gleða okkum at síggja tykkum.

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo
*Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará.*

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.*
*Øll eldri eru vælkomin*